

**Helena Dam á Neystabø**
*landsstýriskvinna*

# »Come on Fólkaflokkurin«

*Viðmerking til samrøðu við formann fólkafloksins í Degi og Viku.*

Høvuðstíðindini í Degi og Viku í gjárkvøldið vóru – at ónevnd samgongufólk halda, at tað er eingin samgonga til.

Eg ætlaði mær ikki at bera við til hetta bál, ið sum einki kann gera tað av við samgonguna. Hóast ósemju um játtanarkarmin fyri 2011 – so hevur samgongan skyldu til at finna eina gongda leið, haldi eg. Men tá ið formaður fólkafloksins púra ótarnaður í Degi og Viku sleppur at mála eina mynd av Javnaðarflokkinum, sum ein ábyrgdarleysan brúkaraflokk, ið vil renna Føroyar út av eggini, so kennir eg meg noyddan at gera eina viðmerking.

## Javnaðarflokkurin er ikki forðingin

Javnaðarflokkurin hevur í verki prógvað, at flokkurin hevur hegni og handalag til at spara innan tað almenna, at steðga útreiðsluvøkstri landskassans og at fremja bygnaðarbroytingar. Vit hava so sanniliga lagt rygg til stór inntriv á fíggjarlógini. Bæði á skúlaøkinum, og á heilsuøkinum og á øðrum økjum við. Og Javnaðarflokkurin hevur við ítøkiligum uppskotum víst á, hvussu man til dømis á fólkaskúlaøkinum kann fáa ein bæði betri og bíligari fólkaskúla, um man vil fremja ein skúlareform – men Fólkaflokkurin sigur bums nei – Fólkaflokkurin sigur eisini bums nei til at fremja ein kommunureform – og til ein fiskivinnureform. Og soleiðis var eisini við ólavsøkupakkanum, Fólkaflokkurin avgreiddi ikki sínar skyldur.

## Bygnaðarligar broytingar gera samfelagið bæði betri og bíligari

Vit hava ferð eftir ferð gjørt vart við – at reformar og bygnaðarligar broytingar høvdu gagnað samfelagnum munandi meira enn hesar ófyrireikaðu sparingarnar, sum bara koma aftur í aftur, so skjótt, ið ættin vendir.

Tað stendur við stórum bókstavum í frágreiðingunum frá Búskaparráðnum, at tað er neyðugt at fremja bygnaðarligar broytingar og at breiðka skattagrundarlagið – fyri netupp ikki at økja um skattatrýstið á tann einstaka borgaran, fyri netupp ikki at leggja stein omaná byrðu hjá tí láglønta, og fyri at varðveita vælferðartænasturnar.

Jørgen Niclasen førdi fram, at Javnaðarflokkurin tekur ikki undir við at leggja almennar eftirlitsstovnar saman – hetta er beinleiðis ósatt. Javnaðarflokkurin fer ikki at forða fyri, at eftirlitstovnar verða lagdir saman, og als ikki um hetta kann gerst bíligari. Jørgen Niclasen segði eisini, at Javnaðarflokkurin var ímóti at seta ein felags almennan innkeypsportal í verk – tað er eisini ósatt. Kann tað spara pening – so sjálvandi.

Men vit halda tað vera skeivt at fremja ein setanarsteðgl! Tí ein setanarsteðgur rakar púra tilvildarligt – líka sum sláimaskinan rakar bæði skeivt og tilvildarligt. Tað er sum at leggja samfelagið í eina frystiboks, og so vóna, at sjúklingurin hevur tað betri, tá ið hann verður tiðnaður upp aftur. So er ikki – tá er hann helst deyður. Vit hava brúk fyri skjótum broytingum og dynamikki. Og tað kann merkja bæði uppsagnir og nýggj størv.

## Fólkaflokkurin »come on«

So Fólkaflokkurin 'come on' – lat okkum fara undir tær bygnaðarligu broytingar, sum hava troðkað á í áravís.

Lat okkum modernisera og rationalisera samfelagið í felag, og lat tað vera sjálvsagt, at vit breiðka skattagrundarlagið hjá landskassanum, so at tað ikki bara eru Palleba og Marsanna, sum skulu fíggja m.a. kongaríkið hjá Jørgeni Niclassen.

Fullveldislandsstýrið lækkaði inntøkur landskassans við at skerja blokkstuðulin – henda skerjing var ikki fíggjað við politiskum tiltøkum ella tillagingum. Fyrra ABC samgongan minkaði eisini inntøkugrundarlag landskassans við at geva fleiri stórar skattalættar – heldur ikki henda skerjing var fíggjað. Nú er tíð upp á at fremja tær tillagingar, sum skulu til.

At renna fleiri 100 fólk afturat út í arbeiðsloysi, er ikki rætti heilivágurin.

Bygnaðarligar broytingar – eitt breiðari skattagrundarlag og ein altjóða viðurkendur fiskivinnupolitikkur, eru týðandi tættir í tí neyðuga politikkinum. Vit vóna at Fólkaflokkurin er við – men er hann ikki við, skal hann siga tað bart út, heldur enn sum undanførslu at leypa á Javnaðarflokkin.

> **At renna fleiri 100 fólk afturat út í arbeiðsloysi, er ikki rætti heilivágurin**

# Nøvn

## Føðingar

25. mars fingu Malena og Jóhan Heri Heinesen, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.

28. mars fingu Ragna Hentze og Trygvi á Reynatrøð, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2940 gr.

28. mars fekk Ragnhild á Plógv Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3350 gr.

29. mars fingu Margith og Mikkel Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3790 gr.

30. mars fingu Lina og Mikkjal Petur Næs, Tórshavn, ein son. Hann eitur Silas Næs. Hann var 35 cm langur og vigaði 990 gr.

30. mars fingu Julie Stryhn og Kenny Stensgaard Nielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3550 gr.

30. mars fingu Eivy Johannesen og Sigvald Kristiansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3290 gr.

31. mars fingu Randi og Zacharis Thomassen, Sandavági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4525 gr.

1. apríl fingu Anna Herta í Kálvalíð og Frank Müller, Signabøur, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3780 gr.

2. apríl fingu Katrina Lognberg, Argjum, og Arnar Lognberg, Skopun, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3960 gr.

6. apríl fingu Eyðgunn Poulsen og Jákup Mikkelsen, Vestmanna, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4050 gr.




SKEIÐ 15. & 16. APRÍL 2010

**Økonomi fyri ikki-økonomar**

**- kom og lær um grundleggjandi økonomi og fíggjarætlanararbeiði**

- Vilt tú betra um tína fatan fyri økonomi og fíggjarstýring?
- So er hetta skeiðið fyri teg! Tú hevur fíggjarliga ábyrgd og tørv á at betra um tína fatan av fíggjarligu samanhangunum á arbeiðsplássinum.
- Gjøgnum báðar skeiðsdagarnar verður títt innlit í fíggjarstýring og fíggjarætlanum ment, og tú verður kunnug/-ur við grundleggjandi orðingar og meginreglur í búskapi.
- Hvussu lesur og skilur tú fíggjarfrágreiðingar og roknskapir?
- Hvussu gjørt tú á ein einfaldan hátt haldgóðar fíggjarætlanir?
- Hvussu heldur tú skil á útreiðslunum við góðum rutinum?
- Hvussu leggur tú fram og formidlar búskaparlig evni við slagkraft og sannføring?
- Skeiðleiðari er John Eli Andersson, ið m.a. undirvísir á fleiri universitetum í Danmark.

Tilmelding og les meira um skeiðið á www.synergi.fo ella ring 322 355

Synergi